# Seinasta útkall

**Tað líkist seinasta útkall hjá TB – og spenninginum í deildini – tá oddadysturin í kvinnudeildini er á skránni um vikuskiftið**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*



*Tað líkist seinasta útkalli fyri spenningini í kvinnukappingini, tá TB vitjar Mjølnir um vikuskiftið*

Enn er sjálvandi nakað tíðliga at tosa um eitt seinasta útkall, men soleiðis sum kvinnukappingin hevur háttað sær higartil í ár, so ber illa til at lata vera kortini.

Mølnir hevur snøgt sagt verið í einum flokki fyri seg higartil, og ikki minst prógvaði 3-0 í Trongisvági, at tað verður sera trupult – fyri ikki at siga ógjørligt – hjá øðrum liðum í kappingini at nerta tær úr Klaksvík.

Skal nakar gera hetta, so eru tað helst tær úr TB, sum eru næstar. TB hevur støðugt verið partur av oddinum í føroyskum kvinnuflogbólti seinnu árini, og hava tær ein góðan dag, so er heldur ikki heilt óhugsandi, at tær kunnu gera eitthvørt, sum kanska kann endurskapa spenningin í deildini.

Og so eru eisini tveir aðrir dystir. Á Kambsdali hittast ÍF og KÍF leygardagin. Og tann dysturin kann væl vísa seg at gerast ógvuliga spennandi. KÍF er í løtuni á bronsuplássinum, og hjá ÍF er umráðandi, at tær fáa stig, skulu tær ikki missa sambandið uppeftir.

Stig skal Dráttur eisini hava, tá fara á vitjan í Sørvági. Sum stigatalvan vísir, so er Dráttur eisini greiður favorittur í hesum dystinum, men hjá sørvágskvinnunum hevur talan verið um eina støðuga framgongd alt árið, so heilt avskrivast skulu tær kortini ikki.

# Oddabrak í Sørvági

**Sunnudagin skal SÍ prógva, at teir ætla sær at halda jólafrí á toppinum**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Tveir dystir skulu spælast í bestu mansdeildini í flogbólti, og í báðum førum tykist talan kunna gerast um heilt spennandi uppgerðir.

Áhugin er kanska størstur fyri dystinum í Sørvági, har Fleyr kemur á vitjan. Bæði liðini hava nýtt hesar seinastu vikurnar til at blaka Mjølnir ov oddasessinum í deildini, og so er spurningurin, hvørt sørvingar nú sleppa at leggja seg einsamallar á odda, ella um Fleyr skal prógvað, at javnstøðan í deildini er fullkomin.

Dystirnir móti Mjølni benda í øllum førum á, at talan er um tvey sera jøvn lið, og so er spurningurin, hvørt sørvingar duga at gera sær dælt av heimavøllinum. Tann fyrimunurin ger í øllum førum, at SÍ mugu metast sum lítlir favorittar undan dystinum. Ikki minst tá teir eisini vunnu dystin í Gundadalshøllini fyrr í heyst.

Ein dystur verður tó eisini leygardagin. Tá skal ÍF royna at fáa síni fyrstu stig, tá Fram kemur á vitjan. Higartil hevur einki vilja borið til hjá ÍF, men í dystinum móti Fleyr fekk liðið í ávísan mun víst, at teir ikki eru heilt eiðasørir, og so er spurningurin, um tað er ein staðfesting, sum eisini kann føra til meira kontanta avrokning á stigatalvuni.

# Fundur um innandurarógving

**Havnar Róðrarfelag og Katrin Olsen bjóða til almennan fund í ÍSF húsinum sunnudagin 5. desember klokkan 15:00. Fundurin fer at snúgva seg um, hvussu farast skal fram, tá ið óalmenna Fm-kappingin í innandurarógving verður 29. januar. Øll eru vælkomin, bæði rógvarar og ikki rógvarar.**

**RÓGVING**
*www.drekin.fo*



Stóra eldsálin í innandurarógvin er Katrin Olsen, sum vit mest kenna sum ein av manningini umborð á Jarnbardi. Katrin býr í Danmark, har hon eisini rør við donskum báti. Hon hevur nógvar royndir í altjóða kappingum, men hon hevur so sanniliga eisini stóran áhuga í innandurarógving. Danskir rógvarar rógva nógv í rógvumaskinum, tá teir um veturin ikki kunnu rógva utttandura.

Nógvar altjóða kappingar í innandurarógving eru um allan heim, og tú kanst gjøgnum telduna rógva ímóti øðrum rógvara, sum býr hinumegin jørðina.

Og nú vil Katrin, at innandurakappingar í rógving koma í fasta legu í Føroyum. Nógvar rógvumaskinur eru kring landið, og Klaksvíkar Róðrarfelag skipaði í 2002 fyri óalmennari Fm-kapping í Klaksvík.

5. desember skipar Katrin Olsen og Havnar Róðrarfelag fyri áhugaverdum fundi í ÍSF húsinum. Rógvarar fáa tá at vita, hvussu kappingin fer fram 29. januar, millum annað vektbólkar, aldursbólkar og møguligir barnaróðrar. Eisini skal tosast um, hvussu stafettbólkarnar skulu rógva, og hvussu langt einstaklingarnir skulu rógva.

Umframt alt viðvíkjandi innandurakappingini, so verður eisini á fundinum tosað um, hvussu tú fært mest burturúr einari rógvumaskinu. Nevnast kann mótstandurin í rógvmaskinuni, og mótstandurin í tøkunum um minuttin róð verður. Eisini fært tú at vita, hvussu rógvararnir skjótast skifta í stafettkappingini.

Annars kann nevnast, at Róðrarsambandið kemur sum so ikki at hava nakað at gera við innandurakappingina 29. januar. Nevndin í RSF heldur hugskotið við innandurakappingini vera frálíkt bæði ítróttarliga og sosialt og vil fegið hjálpa, men RSF vil ikki standa sum fyrireikari.

RSF sigur seg vita ov lítið um slíkar kappingar og tí ikki kann gera reglur og taka avgerðir. RSF leggur aftrat, at fyrireikararnir kunnu ikki kallað kappingina 29. januar eina Fm-kapping. Eitt sersamband í ÍSF skal standa fyri einari Fm-kapping í innadurarógving.

Tað er Havnar Róðrarfelag sum fyrireikar innandurakappingina í rógving 29. januar.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 7 | 7 - 0 | 21 | 4 | 17 | 14 |
| 2 TB | 7 | 6 - 1 | 18 | 7 | 11 | 12 |
| 3 KÍF | 7 | 4 - 3 | 13 | 12 | 1 | 8 |
| 4 Dráttur | 7 | 2 - 5 | 13 | 16 | -3 | 4 |
| 5 ÍF | 7 | 2 - 5 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 6 SÍ | 7 | 0 - 7 | 2 | 21 | -19 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 6 | 5 - 1 | 16 | 6 | 10 | 10 |
| 2 Fleyr | 6 | 4 - 2 | 14 | 8 | 6 | 8 |
| 3 Mjølnir | 6 | 4 - 2 | 14 | 9 | 5 | 8 |
| 4 Fram | 5 | 1 - 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 ÍF | 5 | 0 - 5 | 2 | 15 | -13 | 0 |